# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Sosialurin fer nú at senda útvarp

Um vikuskiftið varð kunngjørt, at Sosialurin hevur keypt útvarpsstøðina, Rás 2. Við hesum keypi taka vit á blaðnum enn eitt fet út í margmiðlaheimin.

Sosialurin hevur í longri tíð arbeitt við at seta á stovn eina útvarpsstøð. Í 2005 fingu vit konsessión, so tá Rás 2 nú var til sølu, so var so upplagt hjá Sosialinum at liggja framvið.

Miðlaheimurin er nógv broyttur seinastu árini. Samanrenningin millum bløð, internet og luftbornu miðlarnar vindur alsamt meira upp á seg – og tað eru longu nógv ár síðani, at vit á Sosialinum tóku internetið til okkara – og er tað ein sjálvsagdur og sera týðandi partur av okkara arbeiðsdegi. Tíðindini á Portalinum koma sera víða, og er Portalurin tann so nógv mest vitjaða føroyska heimasíðan. Vitjanirnar eru so nógvar, at tað svarar til at hvørt mansbarn í Føroyum hvønn dag lesur fimm greinar á portalinum um dagin.

Kanningar í Norðanlondum vísa eisini, at útvarp og internetið er fremst í huga hjá ungdóminum, tá hann verður spurdur, hvønn fjølmiðil hann nýtir mest.

Hetta vilja vit eisini taka til okkara – soleiðis at vit eisini tekkjast ungdóminum við føroyskum viðkomandi tilfari. Samfelagstýdningurin hjá Rás 2 er ikki at undirmeta. Støðin er hvønn dag at hoyra á arbeiðsplássum og virkjum kring landið, har spældur verður góður og glaður tónleikur, sum fær arbeiðsdagin at fella lættari.

Við eisini at senda útvarp fær miðlafyritøkan hjá Sosialinum enn eitt bein at standa á. Tað eru sjálvandi tung tøk, sum skulu takast – bæði fíggjarliga og á programøkinum, so har verður nóg mikið at tríva í hjá nýggju eigarunum.

Sosialurin

## Best man vera sum er

**EYÐGUNN SAMUELSEN**
býráðslimur fyri Javnaðarflokkin



**Skrivingin hjá teimum ið ikki ynskja eitt valdømi fyrikemur mær at vera rættuliga einsíðug. Tey flestu eru ímóti, men hava onki boð uppá, hvat ið so skal gerast, helst tí tey ikki ynskja nakra broyting. Tað er altíð lætt at vera ímóti, avbjóðingin er at vísa á loysnir, ið flest fólk kunnu semjast um**

**Verandi valskipan – fyrimunir og vansar**
Okkara núverandi valskipan er frá 1978, tó eru smávegis broytingar gjørdar síðani, men grundleggjandi skipanin við uppbýti í valdømir er sostatt 29 ára gomul. Ein kann siga, at styrkin í verandi skipan er, at lokal umboðan er tryggjað við ásetingunum um valdømir og valdømisvald tingfólk.

Hinvegin so hevur verandi skipan nógvar veikleikar. Kendasta dømi er, at størsti flokkur ikki av sær sjálvum fær flest tingfólk vald. Eitt annað dømi er, at kvinnurnar, ið stilla upp, ikki fáa ta umboðan, ið talið av atkvøðum, ið tær fáa áttu at gjørt. Við løgtingsvalið í 2004 fingu kvinnurnar oman fyri 20% av atkvøðunum, meðan tær bert fingu 9% av umboðanini (3 limir av 32). Vallógin er heldur ikki soleiðis háttað, at hon tekur hædd fyri broytingum í fólkatalinum millum økini. Tað er ein royndur lutur, at tað skulu 2-3 ferðir so nógvar atkvøður til at fáa eitt umboð valt í Suðurstreymoy sum á Sandoynni.

Bæði Kvinnusamskipan Føroya og Demokratia heittu á Jacob Vestergaard landsstýrismann um at taka atlit til lokala umboðan og kvinnuumboðanina í samband við, at samgongan skuldi gera brotyingar í verandi vallóg. Landsstýrið kundi ikki semjast um broytingar, og landstýrismaðurin avvísti beinanveg, at hann vildi taka atlit til kvinnuumboðan í einum uppskoti til broytingar í vallógini. Sum kunnugt er onki broytingaruppskot lagt fram frá landsstýrinum.

Eitt valdømi – fyrimunir og vansar.

At lokala umboðanin ikki er tryggjað við einum valdømi kann vera bæði ein fyrimunur og ein vansi. Fyrimunur skilt á tann hátt, at størri krøv vera sett til tey, ið vera vald, tey skulu duga at orða seg sjálvstøðugt og hava ein boðskap. Hetta er langt ífrá altíð galdandi við verandi skipan. Hetta at veljarin kann seta krøv til tey, ið stilla upp, haldi eg er eitt pluss fyri fólkaræði og vil heilt víst lyfta støðið á politikkinum longur upp enn tað er í dag.

Um eitt valdømi viðførir eina miðsavnan av, hvør ið verður valdur á ting, eri ikki vís í at tað er so, men um tað er so, so er tað sera óheppi fyri fólkaræðið. Men tað er líka so óheppi, at forðingar eru skipanini, so vit ikki fáa fleiri kvinnur á ting.

At fara í óðamannaverki 2-3 mánaðir innan eitt løgtingsval at broyta skipanina til eitt valdømi kann vera sera óheppi. Ongin lýsing er av avleiðingunum hvørki positivum ella negativum avleiðingum. Høvdu politikarnir veruliga vilja nakað, so kundi ein t. d minkað talið av valdømisvaldum so líðandi t. d. yvir tvey valskeið. Tó haldi eg, at vit skulu varðveita eina lokala umboðan á sama hátt, sum vit eiga at strika tær forðingar, ið eru fyri at kvinnur kunnu vera valdar. Eitt stig kundi verið beinanveg at samtykt, at um ein flokkur hevur tveir listar, so telja teir sum ein, tá valdømisvaldu umboðini vera tillutað flokkunum. Eitt annað, ið kundi verið gjørt beinanveg, var at flokkarnir stillaðu upp í nummarrøð annahvørt valevni maður og annahvørt kvinna.

**Niðurstøða**
Sum eg síggi støðuna í dag, so hava vit tveir bólkar í hesum spurningi, ein ið ynskir eitt valdømi og ein, ið ynskir alt at vera sum er og tí ikki kemur við nøkrum uppskotum til broytingar. Ein má tí koma til ta niðurstøðu, at tey, ið eru ímóti einum valdømi ikki ynskja, at krøv skulu setast til tey, ið stilla upp, ikki ynskja at rætta upp á skeivleikar í verandi skipan og ikki ynskja fleiri kvinnur á ting.

Hetta er sera spell og fer at gera, at vit ógvuliga sannlíkt fara at fáa eina valskipan ið bert ein partur av fólkinum kann góðtaka.

http://heima.olivant.fo/~eydgunn/

## Mótmæli

**WILLIAM DAM**



Vísandi til hugburð tingmanning Tjóðveldisfloksin um parlag – mann við mann og kvinnu við kvinnu, sum stríðir ímóti Bíbliunnar meginreglu, verði eg at taka meg úr nevndini og úr Norðoya Tjóðveldisfelag.

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.